# Óvæntað



*Jan Christiansen er eitt sindur skelkaður av, at Tórshavnar kommuna liggur so niðarliga í hagtølunum á skúlaøkinum. Hann sigur, at skúlastjórarnir í kommununi siga við jøvnum millumbili, at teir eru væl nøgdir við viðurskiftini á skúlaøkinum í kommununi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen, er eitt sindur skelkaður av, at kommunan liggur so niðarliga í hagtølunum. – Vit raðfesta skúlaøkið høgt í kommununi, og skúlastjórarnir í Havn hava givið til kennar, at teir eru væl nøgdir við støðuna, so eg eri eitt skelkaður av hasum hagtølunum, sigur borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu**

KOMMUNUHAGTØL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tá vit greiða borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu um nýggju hagtølini yvir skúlaøkið, og at Tórshavnar kommuna liggur niðarliga, gerst hann ikki sørt yvirraskaður. – Vit raðfesta skúlaøkið høgt kommununi, og skúlastjórarnir í kommununi hava givið til kennar, at teir eru væl nøgdir við støðuna, so eg eri eitt skelkaður av hasum hagtølunum, sigur borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu.

Jan Christiansen greiðir frá, at skúlastjórarnir siga við jøvnum millumbili, at teir eru rættiliga glaðir fyri støðuna á skúlaøkinum, og takka okkum fyri góðu viðurskiftini. – Talan er nærmast um eina sólskinssøgu á skúlaøkinum millum okkum og skúlastjórarnar, sigur Jan Christiansen.

## Ansa eftir

Borgarstjórin í Havn sigur skemtandi, at tað eru trý sløg av lygnum. Tann svarta, tann hvíta og so hagtøl, og vísir á, at ein skal ansa væl eftir við at gera niðurstøður út frá bara hagtølum.

– Ein má hava fyri eyga, at Tórshavnar kommuna hevur ikki havt nakra skúlabygging, síðan í 70 árunum. Vit hava gjørt vanligt viðlíkahaldsarbeiði øll árini, men eingin nýbygging er gjørd, og tað má verða ein av orsøkunum, at vit ikki standa okkum so væl í hagtølunum greiðir Jan Christiansen frá.

Hann vísir á, at størru kommunurnar í landinum hava lægri útreiðslur fyri hvønn fólkaskúlanæmingin, tí størru kommunurnar hava stórdrifts fyrimunir, sammett við smærru plássini.

Jan Christiansen sigur at enda, at verður hugt at árinum 2003, so eru pengar settir av til nýggjan skúla í Hoyvík, Kollafjarðar skúla og í Kaldbak, og vóru tølini fyri 2003 tikin við, var støðan óivað ein onnur.

# Havnin er eftirbátur

**Nýggj hagtøl fyri kommunurnar í Føroyum geva eina greiða ábending um, at Tórshavnar kommunu letur væl minni til skúlaøkið enn flestu kommunurnar í landinum. Upphæddin, sum høvuðsstaðarkommunan nýtir í miðal upp á hvønn fólkaskúlanæming í kommununi, er væl minni, enn bæði Runavíkar- og Klaksvíkar kommuna brúka. Havnin er eisini væl undir miðaltalinum fyri alt landið**

HAGTØL UM SKÚLAØKIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hagstova Føroya hevur fyri fyrstu ferð almannakunngjørt hagtalstilfar um kommunurnar í Føroyum. Á heimasíðuni hjá Hagstovuni eru rúgvumikil kommunufíggjarhagtøl innsavnað. Endamálið við innsavningini er at útvega borgarunum upplýsingar um føroysku kommunurnar, so borgararnir fáa møguleika at samanbera fíggjarstøðuna hjá ymisku kommununum kring landið. Hagtalstilfarið gevur eisini møguleika fyri at samanbera støðuna hjá føroyskum kommunum við kommunur í útlondum.

Á heimasíðuni eru hagtøl innsavnað yvir fleiri ymisk øki. Nevnast kann skúlaøkið, eldraøkið og barnaansing. Av Hagstovu Føroya siga tey, at neyðugt er at taka nøkur fyrivarni við at saman bera eldraøkið og barnaansingina í kommununum kring landið, meðan hagtølini fyri skúlaøkið eru lættari at samanbera.

Tað eru eisini júst hagtølini fyri skúlaøkið, sum er rættiliga áhugaverd. Hagtølini á skúlaøkinum í Føroyum geva eina greiða ábending um, at tað er rættiliga stórur munur á, hvussu høgt kommunurnar kring landið raðfesta skúlaøkið.

## Havnin afturúr

Størsta kommunan í landinum, Tórshavnar kommuna, raðfestir, sambært hagtølunum, ikki skúlaøkið serliga høgt. Sammeta vit tær tríggjar størstu kommunurnar í landinum, Tórshavnar-, Klaksvíkar- og Runavíkar kommunu, so vísa hagtølini greitt, at høvuðsstaðarkommunan er eftirbátur á skúlaøkinum. Havnin letur væl minni av peningi í miðal til hvønn fólkaskúlanæming í kommununi, enn bæði Klaksvík og Runavík gera.

Hagtølini vísa, at bæði í tíðarskeiðnum 1993-97 og 1998-2002 hevur størsta kommunan í landinum latið væl minni enn bæði Klaksvíkar- og Runavíkar kommuna í miðal fyri hvønn fólkaskúlanæming í kommununi.

Henda mynd er heldur óvæntað, tí tað er ein sannroynd, at høvuðsstaðarkommunan seinastu mongu árini hevur mest áhugaverd kommunan at seta búgv í. Flestu høgu størvini finna vit í Havn, og tað er eisini í høvuðsstaðnum, at størstu skattaintøkurnar eru. Nógv børn eru í kommununi, og tí kann tað tykjast løgið, at skúlaøkið ikki verður raðfest hægri.

Á aðrari av grafunum á síðuni sæst eisini, at Havnin er ikki bert afturúr sammett við Klaksvík og Runavík, men kommunan er eisini væl undir miðaltalinum yvir allar kommunurnar í landinum.

Her skal kortini leggjast afturat, at Hagstova Føroya staðfestir í niðurstøðu síni fyri skúlaøkið, at hagtølini vísa greitt, at størru kommunurnar hava lægri útreiðslur fyri hvønn næming enn smærri kommunurnar.

Orsøkin er stórdriftsfyrimunirnir, sum størri kommunurnar hava, sammett við tær smærru. Miðaltalið fyri landið skal tí setast í eitt ávíst perspektiv. Hetta er eisini orsøkin til, at vit júst hava valt at samanbera Tórshavn, Klaksvík og Runavík, tí hesi pláss minna nógv um hvønn annan í støðd.

## Runavík væl fyri

Av teimum trimum størstu kommununum í Føroyum, nýtir Runavíkar kommuna mest pening til fólkaskúlaøkið. Í tíðarskeiðnum 1993-2002 hevur Runavíkar kommuna nýtt í miðal 10.618 krónur um árið upp á hvønn fólkaskúlanæming í kommununi.

Hetta er væl meir enn eitt nú Tórshavnar kommuna, sum sama tíðarskeið hevur nýtt 7.240 krónur í miðal um árið fyri hvønn fólkaskúlanæming. Í miðal fyri tíggjuáraskeiðið 1993-2002 hevur Runavíkar kommuna sostatt nýtt góðar 3.400 krónur meir upp á hvønn næmingin enn Tórshavnar kommuna. Mitt í millum Havnina og Runavík liggur hin stóra kommunan í landinum, Klaksvíkar kommuna. Hon hevur sambært hagtølunum nýtt 9.039 krónur í miðal fyri hvønn fólkaskúlanæming millum í tíðarskeiðnum 1993-2002.

## Ymiskar bókingar

Sum við flestu hagtølum, so skal hagtalstilfarið yvir kommunurnar í Føroyum eisini lesast við nøkrum fyrivarnum. Ein gjøgnumgangandi trupulleiki hjá Hagstovuni hevur verið, at tað er rættiliga ymiskt, hvussu tær kommunurnar bóka sín roknskap. Fyri at fáa so haldgóð og røttvís hagtøl hjá kommununum sum gjørligt, hevur Hagstova Føroya nýtt ein fasta mannagongd(metodu).

Hagstovan hugdi fyrst at, hvussu stórar útreiðslur, hvør kommuna í landinum hevur nýtt til skúlaøkið. Útreiðslurnar eru gjørdar upp í nettotølum. Fyri at kunna samanbera kommunurnar, eru samlaðu útreiðslurnar eru býttar við tali av børnum í aldrinum 7-17 ár í teimum ymisku kommununum. Hesin aldursbólkar verður roknaður sum børn og ung, ið ganga í fólkaskúla.

Fyri at geva so rættvísa mynd av útreiðslunum til fólkaskúlan fyri hvørt barni, hevur Hagstova Føroya síðan hugt at tølunum yvir eitt longri tíðarskeið. Nettoútreiðslurnar til fólkaskúlan í ymisku kommununum eru roknaðar yvir eitt tíggjuáraskeið. Við at hava eitt longri tíðarskeið, tryggjar Hagstova sær, at hagtølini geva eina rættvísari mynd, hvussu nógv verður sett av til skúlaøkið í hvørjari kommunu.




*Stabbamynd av útreiðslunum hjá trimum størstu kommununum í landinum og miðaltalið fyri 1993-2002*




*Upphædd til hvønn fólkaskúlanæmingMynd av netto- og íløguútreiðsnum hjá kommununum til fólkaskúlan í árunum 1993-2002*

| | 93-97 miðal | 98-2002 miðal | 93-2002 miðal |
|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | 5.892 | 8.587 | 7.240 |
| Klaksvíkar kommuna | 6.095 | 11.984 | 9.039 |
| Runavíkar kommuna | 7.628 | 13.607 | 10.618 |
| Tvøroyrar kommuna | 9.641 | 14.531 | 12.086 |
| Fuglafjarðar kommuna | 9.051 | 14.111 | 11.581 |
| Vágs kommuna | 5.926 | 7.871 | 6.898 |
| Miðal fyri landið | 7.063 | 11.043 | 9.053 |

Fakta: Upphæddin, hvør kommuna nýtir upp á hvønn fólkaskúlanæming í miðal.

# Viðlíkahald avgerandi



*Borgarstjórin, Rodmund Nielsen, heldur, at íløgur í viðlíkahald á skúlarnar gjøgnum øll nítiárini er avgjørt ein orsøk til, at kommunan liggur so ovarliga í hagtølunum yvir skúlaøkið.*

*Mynd: Savnsmynd*

**Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, heldur, at orsøkin til, at kommunan er so ovarliga í hagtølunum á skúlaøkinum er, at hon gjøgnum øll nítiárini gjørdi umfatandi íløgur í viðlíkahald í skúlarnar**

KOMMUNUHAGTØL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Runavíkar kommunu er ikki nógv fyri at breggja sær av, at skúlaøkið í kommununi verður sambært hagtølunum hjá Hagstovuni betri røkt, enn bæði í Klaksvík og Havn. Hann er kortini rættiliga avgjørdur, tá vit spyrja hann, hvussu tað ber til, at kommunan letur meir til skúlaøkið, enn hinar báðar stóru kommunurnar í landinum.

– Eftir kreppuna var neyðugt við nógvum ábøtum á skúlarnar í kommununi, og tí vórðu nógvir pengar settir av til viðlíkahald av skúlanum gjøgnum øll nítiárini. Vit hava fýra skúlar, so útreiðslurnar til viðlíkahald eru stórar, og júst tað má verða ein orsøk til, at vit liggja so ovarliga í hagtølunum, sigur Rodmundur Nielsen.

## Samanlegging

Mentanarnevndin í Runavíkar kommunu arbeiðir við í løtuni at finna loysnir, so skúlaøkið verður bíligari at reka hjá kommununi í framtíðini. Í Runavíkar kommunu eru í dag fýra skúlar. Runavíkar kommuna umhugsar at leggja skúlarnar í Runavík, á Glyvrum, Rituvík og Søldarfirði saman, so raksturin bíligari og skúlaøkið verður lættari at samskipa.

Borgarstjórin, Rodmundur Nielsen dylir ikki fyri, at tað er ein tung byrða at samla allar skúlarnar, og tað krevur nógva orku at finna eina haldgóða loysn. Hann metir kortini, at samanleggingin er neyðug, tí raksturin er ov dýrur at hava so spjatt skúlaverk í kommuni

## Skammast ikki

Rodmund Nielsen sigur, at stór orka verður løgd í skúlaøkið í kommununi. Hann heldur, at økið er høgt raðfest, og at kommunan hevur onga orsøk til at skamma seg yvir støðuna á skúlaøkinum.

Spurdur, um borgararnir í kommununi eru nøgdir við støðuna á skúlaøkinum, svarar borgarstjórin, at tað kann væl hugsast, at nøkur eru ikki heilt nøgd um støðuna.

– Tað eru óivað borgarar í kommununi, sum ikki eru so glaðir um nógvu koyringina millum skúlarnar, tí skúlarnir samstarva um sergreinir, men tí málinum arbeiða vit við. Vónandi hava vit funnið eina loysn, áðrenn hetta valskeiðið er av, sigur borgarstjórin í Runavíkar kommunu at enda.

# Rætting

Í grein í blaðnum leygardagin um sunnan mat í Hoyvíkar skúla, hevur blaðmaðurin gjørt eitt mistak. Tað varð skrivað, at Hoyvíkar skúli rindar fyri frukt og skúlabreyð til næmingarnar í skúlatíðini, men hetta er ikki heilt rætt. Tað eru foreldrini, sum rinda fyri sunnan matin hjá børnunnum, og ikki skúlin. Vit biðja orsaka mistakið.

**blðm.**

Jólatilboð 15. des. 2003 - 4. jan. 2004
Til Keypmannahavn .................. t/r Dkr. 1.695,-
Til Billund ................................ t/r Dkr. 1.733,-
Ymiskar treytir eru galdandi. Prísirnir eru uttan avgreiðslugjald á Dkr. 220,-
Minst til títt Maersk Air Bonuskort
www.maersk-air.fo
Bilegging hjá Maersk Air í Tórshavn á tel. 35 74 74,
og á øllum ferðaskrivstovunum kring landið.
MAERSK AIR
It's got to be perfect